

## Søguligt skip í Íslandi

Í morgun kom tað kenda ferðamannaskipið Queen Elizabeth 2 inn á Ísafjørðin í Íslandi. Skipið, sum er 70.000 tons stórt, slapp ikki at bryggju. Umleið 1.800 ferðafólk eru við á ferðini í Íslandi, og tey, sum vildu sleppa í land, máttu siglast aftur og fram. Queen Elizabeth 2 er bygd í 1967 og hevur siglt tvørtur um Atlantshavið 801 ferðir. Skipið var flaggskip hjá reiðarínum Cunard, til reiðaríið fekk tað nýggja Queen Mary 2 fyri fýra árum síðani.

# Húskallar venja



**Í vikuni hava húskallar hitað upp, nú teir eru settir á lepan hjá Summer Festivalinum. Teir eru millum tey nøvn, ið hava sonevnt kult-status, tí einans útgáva kom frá teimum, ið fór beinleiðis í føroysku tónleikasøguna, men síðani hoyrdist ikki meira alment frá teimum. Hóskvøldið eru húskallarnir tó aftur aktuellir á palli**

SUMMAFESTIVALUR
*orð og myndir: Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Húskallarnir vóru fleiri í Føroyum í gomlum døgum, men hetta er rárt fólkaslag í Føroyum í dag.

Tó finnast tað húskallar í Føroyum enn, hóast landbúnaðurin ongantíð gjørdist størst í vinnuhøpi, men í tónleikahøpi krevjast eisini teir, ið ganga undan og velta upp úr nýggjum.

Og fyri eini 15 - 20 árum síðani kom ein útgáva á føroyska marknaðin, ið veruliga gjørdi hol í sjógvin. Húskallar góvu útgávu út, ið var heldur øðrvísi á so mangan hátt. Tekstirnir sóu væl, og ikki minst var dygd í tónleikinum. Her var talan um væl tilrættisløgd løg, og eisini bar útgávan brá av, at góðir handverkarar handfóru ljóðførini.

Bólkurin hevði uppruna í Leirvík, við greinum bæði til Havnar og Suðuroyar.

Tveir av grundarsteinunum í bólkinum, Kaj Johannesen og Jón McBirnie, vóru nokkso nýkomnir havnarmenn, annar úr Leivík og hin úr Vági. Báðir vóru teir dygdargóðir tónleikarar, ið vildu okkurt.

Og júst hetta "okkurt" gjørdi, at Kaj fekk sett á stovn Leirvíksbólkin Húskallar. Ein bólkur, sum hevði leirvíkingar sum grundarsteinar, men sum við bassleikaranum Jón fekk rætta botnin við.

Kaj hevði áður roynt seg við bólkum á Leirvíksleiðini, og nevnast kann t.d. Sir Funeral Band.

Alt í alt vóru hetta menn, ið tordu at røra í greytinum og fáast við tónleik, ið hevði eitt sindur meira at

